Torleif Johannesen., sjómanstrúboðari:

# At vitja sjófólk á opnum havi er nakað serligt

**Allir fjølmiðlar ynskja at verða "móttakarunum" so nær og viðkomandi sum gjørligt. Hetta er tí ein av teimum størstu avbjóðingunum hjá teimum. Nútíðartøknin hevur eisini skundað undir hesa gongd**

At koma út við boðskapinum, er ikki bara ein avbjóðing hjá fjølmiðlunum, men eisini hjá teimum, sum eru virkin í Guds ríkis arbeiði.

### Nær sjófólkinum.

Føroyska Sjómansmissiónin var stovnað í 1918. Øll árini síðani hevur tann stóri spurningurin verið: Hvussu náða vit best sjófólkið við gleðiboðskapinum?

Hetta hevur so ført við sær, at Sjómansmissiónin eftir førimuni hevur roynt at verið nær og viðkomandi fyri føroyskar sjómenn, har teir hava verið.

Tað førdi millum annað við sær, at sjómansheim kom í Føroyingahavnini, Sjómansstova í Vestmannaoyggjunum og í Reykjavík og so sjómansheimini her heima.

Sjómansmissiónin hevur eisini sent trúboðarar til støð, har fleiri sjómenn hava verið í styttri ella longri tíð.

### Vitjað úti í sjónum

Eitt av nýggjastu tiltøkunum hjá Sjómansmissiónini er, at sjómanstrúboðarin hevur verið úti á fiskifeltinum og vitjað skipini. Endamálið er fyrst og fremst at boða Guds orð, men eisini at vitja sjómennirnar í teirra dagliga arbeiði.

Summarið 2000 var eg og vitjaði nótaskipini uppi við Jan Majn.

Síðsta summar var eg og vitjaði rækjuskipini á Flemish Kap. Hetta var ein longri ferð, sum eg var sera glaður fyri. Mín uppliving var, at sjómennirnir eisini vóru glaðir fyri vitjaninna. Av teimum níggju føroysku skipunum, sum veiddu har, var eg umborð á sjey. Allastaðni var eg væl móttikin, og so at siga allir mennirnir møtti upp til møtini. Eg bleiv silgdur millum skipini í "mobbátinum" (bjargingarbátinum). Eg var millum 3 og 6 dagar umborð á hvørjum skipi. Áðrenn eg kom heimaftur, var eg eisini ein túr við South Island sum "maður".



*Torleif Johannesen hevur vitjað umborð á nótaskipum í Barentshavinum og rækjuskipum á Flemmish Kap. Allastaðni er hann væl móttikin*

At vitja sjómennirnar úti í sjógnum, mitt í teirra dagliga arbeiði og lívi, er nakað serligt. Tú kemur longri inn á teir við at verða saman við teimum í nakrar dagar, enn tá eg vitji teir, tá ið skipið liggur við bryggju. Tá er so nógv annað, sum teir eru upptiknir av.

### Sóu seg sjálvar

Allir sjómennirnir vóru bæði vinarlig ir og opnir, hóast onkur fyrst skuldi vita, hvat tað var fyri eitt „skepilsi", sum var komið at vitja, áðrenn samrøðurnar veruliga komu í gongd.

Ofta fáa vit góðar samrøður við fólk, sum vit arbeiða saman við. Tí royndi eg eisini at hjálpa til á verksmiðjuni við at gera eskjur og annað, tá ið ein løta var til tað.

Videoupptakara hevði eg við. Filmað bleiv eitt sindur umborð á hvørjum skipi. Tað var bæði stuttligt og "kryddraði" lívið umborð, tá teir sóu seg sjálvar løtu seinni í sjónvarpinum. Tá kundi millum annað hoyrast: "Síggji eg soleiðis út"? "Pu- ha! Eri eg veruliga so feitur"?

Eisini dámdi teimum væl at hyggja eftir tí, sum eg hevði filmað umborð á hinum skipunum.

### Hví Sjómansmissión?

Er tað neyðugt við Sjómansmissión?

Í einum landi sum Føroyar, har havið er størsta einstaka arbeiðsplássið, er neyðugt við fólki, sum eisini kennir neyð fyri at fáa gleðiboðskapin út til teirra. Tí meti eg, at tað er neyðugt við Sjómansmissión. Eg trúgvi neyvan, tað er nakað sjófólk, sum so nógv verður biðið fyri, sum fyri tí føroyska. Tí skal tað eisini her ljóða ein hjartans tøkk til tykkum mongu, sum biðja fyri sjófólkinum, fyri Sjómansmissiónini og sum stuðla bæði andaliga og fíggjarliga.

Gud signi sjófólkið og alt Føroya fólk.





# Framhaldandi frítt at fiska svartkjaft

FISKIVINNU-SAMSTARV

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Føroyski fiskimálaráðharrin, Jørgen Niclasen og íslendski fiskimálaráðharrin Árni M. Matthiesen eru samdir um at føroyskir og íslendskir svartkjaftatrolarar framhaldandi kunnu veiða frítt inni hjá hvørjum øðrum. Ella skilt á tann hátt, at orðingarnar um avmarkingar eru so veikar, at ilt er at skilja hetta ørvísi enn frí veiða. Orðiingin í tíðindaskrivinum, sum varð gjørt beint eftir samráðingarnar ljóðar soleiðis: "Vegna støðuna í svartkjaftastovninum, samdust partarnir um at avmarkað svartkjaftaveiðuna fyri síni skip. Føroyingar vístu á galdandi reglur um avmarkað skipatal á høvuðsøki í føroyskum sjógvi. Hósdagin og fríggjadagin í seinastu viku hittust teir á fundi í Reykjavík.

Partarnir eru samdir um at hava somu avtalu fyri 2002 sum í 2001. Hetta merkir at føroysk skip kunnu veiða 5600 tons í íslendskum sjógvi at botnfiski í ár. Av hesi heildarveiðu verður toskakvotan óbroytt 1200 tons og kalvakvotan verður 80 tons. Kalvin skal veiðast í tíðarskeiðnum 1. juni til 31. august.

Umframt svartkjaftin ,so kunnu íslendingar veiða 2000 tons av heystgýtandi sild í føroyskum sjógvi og 1300 tons av makreli. Føroysk skip kunnu eisini veiða 30.000 tons av lodnu í íslendskum sjógvi, umframt 10.000 tons av lodnu, sum er av grønlendsku lodnukvotuni.







petur & petur • 320870

P/f Sveisingahandilin

P/f Sveisingahandilin hevur síðan 1948 verið í menning, og er í dag ein av størstu veitarum av sveisiútgerð í landinum.

Vøruúrvalið umfatar alt innan sveising: Ilt, gass, Argon, Argonmix, Nitrogen, Co2 vm. Bøhler, Orlikon og Saf elektrodir. Castolin lodditráð. Cemont og Fronius sveisiapparat. Gloor & Orlikon sveisi- og skerisett.

Vit hava eitt stórt úrval av trygdarútgerð og amboðum.

Vit eru eisini einaumboð fyri Mobil smyrjioljur.



Mobil Oil Føroyar

**P/f Sveisingahandilin**
Mykinesgøta 8
Boks 18
FO-110 Tórshavn
Tel 311909 – fax 311509
E-mail: sveising@post.olivant.fo

**Mobil Oil Føroyar**
Mykinesgøta 8
Boks 18
FO-110 Tórshavn
Tel 319354 – fax 311509
E-mail: sveising@post.olivant.fo